

# Norðoya-tunnilin!

Lag:"Stórhvalagildið!"

Teir standa har á Leirvíks- kaj tveir fittir gamlir jassar
Teir festa sær í ballini og seta seg á kassar
Síðan prátið fer í gongd - um yvirflóð og neyð og svongd
Hurlivas í verðini, men her alt loysast kann.

So við og við teir nærkast heita evninum á staðnum
Teir eru ikki samdir báðir, skilir tú á lagnum
Annar heldur uppskot tvey - brúkast kann, men bert av neyð
Hin hann heldur tunnil undir bygdini er best.

Men prátið skiftir skjótt - nú er tað mest um stóra dagin
Tá Ternan siglir síðsta túr av fólk og bilum laðin
"Hetta fer at merkjast her - hetta er jú alheimsgerð!"
Segði annar Leirvíkingurin og spýtti langt!

"Nú kann eg koyra út í Grøv at vitja vinin Óla
Um somu leið kann Óli koma her til mín at Bowla!
Men Føroya Bjór tó prísin ber - tekur bara eitt korter
Leingi livið tunnilin, sum lívið lætt nú ger!"

"Og lættari er nú hjá teimum ungu til at fríggja
Men bara tey nú ikki til Getshemane øll flýggja
Tað verður ikki uttan kamp - tey taka nakran línustamp
Tá Klaksvíkin og Havn tey draga hart í hvørt sítt borð!"

Teir gomlu sita tonkum í, ja eina góða løtu
So sigur annar, sum víst hevði ættarbond úr Gøtu:
"Mangt er broytt í míni tíð - Tróndur gamli Gøtu í
Hevði vent sær Gjónni í, um hetta alt hann sá!!"

**RoMBi 2006**

# Norðoyatunnilin veruleiki




lag: Havnarmarsjurin...............

Nú brast so fyri nev enn  eitt undirsjóvarhol,
øll eru nú so spent - eingin hevur longur tol
at sjabba meir við Dúgvuni henda lúsa fjørð,
:´: nú undir havsins botni skal ferðast ein og hvør:´:

Jú, mangur rullutúrur um Klakk og Galvin var,
var ættin ei til vildar og ´móti streymi bar,
í Leirvík gjørdist vandi, um Dúgvan hon fór tvør,
so var at broyta kós og so inn á Fuglafjørð.

Men tann, sum fer í holið, ei hevur nakra trygd,
at víðari hann sleppur ígjøgnum Leirvíksbygd,
tí har skal gerast tunnil og lokarenna við,
ein vegur skal í erva og ein skal niðari.

Ei undir í um Geytin og Leirvíks Páll ísenn
í gravunum sær remba og grísla sínar tenn,
at rok skal vera um, hvar ein vegastubbi fer,
helst luksustrupulleika teir skíra hetta her.

Við hesum stóra bragdi vit styrkja tjóðarbond,
nú eystur rætta vestri kann holla frændahond,
og kveikjast nýggir tankar og hugsjónir við meir,
fer hetta verk at vera til framburð fyri fleir´.

Øll forðing er nú burtur og hvør ein leið er gongd,
og manni frítt at fara, ei nøkur rás er stongd,
tó suðurrásin vantar – tað verður – tað er greitt –
eitt ódnartak at taka, men so er landið eitt!

Vit ynskja okkum øllum tillukku henda dag,
og heilsa hesum nýggja í góðum veitslulag,
við sorgblídni vit venda tí gamla, góða bak
tað tænti fyri seg – og tað tænti síni sak.

**NePtuN(2006)**